ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tit vága tykkum ikki at gera nakað aftan á sigur okkara, tí vit fara ikki at sita hendur í favn*

*Robert Mugabe við andstøðuna*

# Tað kann loga eina viku afturat

**Bjargingarmenninir í Ålesund hætta sær ikki inn í tey rapaðu húsini, fyrr enn eldurin í húsaleivdunum er slóknaður**



*Tað kann ganga ein vika, áðrenn eldurin hevur brent alt gassið*

*Mynd: Polfoto*

Tað logar enn í húsunum á Fjelltunveien í Ålesund, sum rapaðu mikunáttina, og tað er vónleyst hjá bjargingarliðunum at sleppa inn at leita eftir teimum fimm fólkunum, sum ikki eru komin afturíaftur eftir vanlukkuna.

Í gjárkvøldið varð roynt at fáa eina slangu við einum serligum myndatóli inn í húsaleivdirnar, men tað miseydnaðist.

Eldurin í húsunum stavar frá einum gasstanga undir húsagrundini. Hann tekur 4.000 litrar av, og leysligar útrokningar vísa, at har er nóg mikið av gassi, til at tað kann loga millum fimm og sjey samdøgur afturat, sigur sløkkiliðstjórin í Ålesund, Svein Dalen, við NRK.

Upprunaliga stúrdu fólk fyri, at gasstangin kundi fara í luftina, men vandin fyri spreingingi er ikki so stórur longur. Harafturímóti er vandi fyri, at allur íbúðarblokkurin skal rapa, tí stálið og armeringin vikna sum frá líður, sigur NRK.

# Nú fellur avgerðin um Motzfeldt

**Í dag fæst kanska at vita, um Jonathan Motzfeldt verður ákærdur fyri kynsligan ágang**



*Jonathan Motzfeldt noktar seg sekan*

*Mynd: KNR*

Tað var í august í fjør, at ein kvinna, sum arbeiðir í umsitingini hjá Landstinginum, meldaði táverandi tingformannin til løgregluna fyri kynsligan ágang. Í seinastuni hevur ferðaliðið hjá ríkisløgregluni kannað málið, og grønlendska blaðið AG sigur frá Steen Silberg Thomsen, løgreglustjóra í Nuuk, at um nakrar dagar verður avgjørt, um ákæra verður reist ella ikki.

- Tað kann henda í dag ella í seinasta lagi mánadagin, sigur løgreglustjórin við AG.

Upprunaliga legði løgreglan í Nuuk málið til viks. Kvinnan kærdi avgerðina, og ríkisadvokaturin gjørdi av at taka málið uppaftur.

Jonathan Motzfeldt hevur alla tíðina noktað seg sekan, men hann gjørdi kortini av at siga starvið sum tingformaður frá sær.

# Ingrid Betancourt sleppur kanska leys nú

**Kolombiska stjórnin er sinnað at lata nakrar uppreistrarmenn leysar í býti við fyrrverandi forsetavalevnið Ingrid Betancourt og aðrar gíslar**

Vinstrasinnaða uppreistrarrørslan í Kolombia burturflutti í 2002 forsetavalevnið Ingrid Betancourt. Síðani hevur rørslan fleiri ferðir boðið sær til at lata hana leysa í býti við egnar limir, sum sita í kolombiskum fongslum, men hesum tilboði hava myndugleikarnir havnað.

Men sambært BBC er stjórnin nú sinnað at ganga við til eitt býti. Ein talsmaður hjá stjórnini sigur, at stjórnin hevur latið FARC eitt tilboð, sum kann gerast byrjanin til eitt fanga- og gíslabýti. Eygleiðarar halda, at vælvildin hjá kolombisku stjórnini kemst av leysatíðindum um, at Ingrid Betancourt er illa sjúk, og at tað hevur fingið Alvaro Uribe, forseta at taka undir við einari býtisavtalu við FARC.

Ingrid Betancourt, sum er hálv fronsk og hálv kolombisk, er tann best kendi gíslin, sum FARC hevur. Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, hevur heitt á FARC um at lata hana leysa, og somu áheitan hevur rørslan fingið frá venesuelska forsetanum, Hugo Chavez.



*Ingrid Betancourt stillaði upp til forsetavalið í Kolombia í 2002, men bleiv burturflutt mitt undir valstríðnum*

*Mynd: Polfoto*

STUTT SAGT

## Ungfólk myrd í Chicago

Teir seinastu sjey mánaðirnar eru ikki færri enn 20 skúlaungdómar myrdir í amerikanska stórbýnum Chicago, og 18 teirra vórðu teir skotnir. Tey nógvu drápini hava gjørt, at løgreglan heldur støðugt eftirlit við allar skúlar í býnum, og at myndatól eru sett upp nógvastaðni við skúlarnar. Í fjør vórðu 24 skúlanæmingar myrdir í Chicago, og allir vórðu skotnir. Hagtøl hjá amerikonsku myndugleikunum vísa, at 81 prosent av teimum ungu, sum doyggja av ágangi, verða skotin, og talið er veksandi. Hinvegin doyggja færri av vanligum harðskapi nú enn fyrr.

## Tigandi drápsmaður

Fransmaðurin Michel Fourniret, sum er skuldsettur fyri at hava misbrúkt og myrt sjey kvinnur í Fraklandi og Belgia í árunum frá 1987 til 2003, sýtti fyri at siga nakað um skuldsetingina, tá hann kom fyri rættin í gjár. Hann krevur, at dyrnar í rættinum skulu latast aftur, og tá dómarin bað tann skuldsetta siga, hvør hann er, svaraði Founiret, at hann segði einki, fyrr enn allir áhoyrararnir vórðu koyrdir. Men tað vildi dómarin ikki gera. Michel Fourniret hevur eisini vrakað allar verjarnar, sum rættarvaldið hevur tilnevnt honum.

## Hjálpargrunnur fekk bót

Í Indonesia hevur ein dómstólur gjørt av, at grunnurin Supersemar, sum fyrrverandi einaræðisharrin Suharto stovnaði, skal rinda tí almenna umleið 550 milliónir krónur í endurgjaldi og bót. Eftir endamálsorðingini skuldi grunnurin hjálpa fátækum børnum, men myndugleikarnir siga, at meginparturin av pengunum varð latin skyldfólki hjá Suharto. Indonesiska stjórnin heldur uppá, at grunnurin hevur svikað fyri meiri enn tvær milliardir krónur. BBC sigur, at dómstólurin gav stjórnini viðhald í, at grunnurin hevur brotið lógina, men dómstólurin vildi ikki leggja Suharto, sála undir lógarbrot.